# Gøtu Kvøldskúli

## VETURIN 2005/2006

**Boðað verður frá luttøku á hesum støðum:**

| Lærugrein og dagur | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|
| Teld (á byrjunarstigi) (mikukvøld) | Reinhold Isaksen | 441753/225412 |
| Hebraiskt (týskvøld) | Pnina Dam | 311188/511188 |
| Tøving (mikukvøld) | Herbjørg Dalsgaard<br>Margit Glerfoss | 312940/212941<br>313660/226488 |
| Gittarspæl (á byrjunarstigi) (eftir avtalu við læraran) | Martin í Grund | 741619/441619 |
| Klaverspæl (týsdag og hósdag) | Anja Hansen | 441878/741878 |
| Trummuspæl (á byrunarstigi) (týsdag) | Rógvi Lamhauge | 264188/441238 |
| Lær at telva (ung) (týskvøld/hóskvøld) | Reinhold Isaksen | 441753/225412 |

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er 300 kr fyri hvørja lærugrein; tó gjalda tey, sum læra at telva, 50 kr.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna.
Byrjað verður í viku 42 ella eftir nærri avtalu við læraran.

**Gøtu Kvøldskúli**

# Spennandi undirvísingar- og ráðgevingarstarv

Vegna økt virksemi søkir Blái Krossur Føroya eftir fólki at arbeiða við fyribyrgjandi og heilsufremjandi tiltøkum at byrja 1. november 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan verður í tøttum samstarvi við fyribyrgingarleiðaran at undirvísa, ráðgeva og menna fyribyrgjandi arbeiðið hjá Bláa Krossi Føroya.

**Førleikar / eginleikar**
- Tú ert útbúgvin lærari ella hevur líknandi hægri útbúgving.
- Tú hevur áhuga og innlivingarevni í nýggj tiltøk.
- Tú ert álitisvekjandi og álítandi.
- Tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja.
- Tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt.
- Tú hevur kunnleika til vanlig telduforrit.
- Tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini.
- Tú brennir fyri at hjálpa børnum og ungum til eitt tryggari og betri lív.

**Løn/setanartreytir:**
Starvið er eitt fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Lønin verður ásett sambært avtalu.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyribyrgingarleiðaran, ella aðalskrivaran á tel. 470 700

Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal verða Bláa Krossi Føroya, Heiðavegur 6, 620 Runavík í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. oktober.

*Blái Krossur Føroya hevur smb. §2 í viðtøkum felagsins til endamáls:*
- *At hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum.*
- *At fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni.*
- *At virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi.*
- *At boða gleðiboðskapin um Guðs kærleika til menniskju.*

**Blái Krossur**
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

Heiðavegur 6 · 620 Runavík · Tel 470 700 · Faks 470 701 · blakross@blakross.fo · www.blakross.fo

# KVÍVÍKAR KVØLDSKÚLI

## VETURIN 2005/2006

**Treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna kann skúlin bjóða:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tøving, spinning og plantuliting | mánakvøld | Margit Glerfoss/ Herbjørg Dalsgaard | 313660/312940/226488 |
| Vatnfimleikur | mikukvøld | Jórun Simonsen | 421203 |
| Hornarbeiði | vikuskiftir | Rasmus Nygaard | 314816 |
| Et rætt/liv lætt | hóskvøld | Edna Einarsson | 421289/270089 |
| **Luttøkugjaldið er kr. 300,-** | | | |
| Kórsangur | eftir avtalu | Ólavur Hátún | 311819/211888 |
| Telving fyri børn | eftir avtalu | Tórarinn Niclasen | 421505 |
| **Luttøkugjaldið er kr. 150,-** | | | |

**Byrjað verður í viku 42. Tó byrjar vatnfimleikur ikki fyrrenn umbyggingin er liðug, eftir 1. november.**

# Meginfelag áhugaleikara Føroya

# SJÓNLEIKARASTEVNAN 2005

**Árliga sjónleikarastevnan hjá MáF verður í Klaksvík 4. - 6. november 2005**

***Evni/tema:***
**Føroysku kvæðini úr dansistovuni upp á pall**

**Undirvísarar:**
**Árni Dahl, Mikkjal Helmsdal, Eyð Matras og Birita Mohr**

***Kom á sjónleikarastevnu sjónleikur og hugni***

**Tilmelding hjá MáF á tel. 31 56 24 ella maf@maf.fo**

# Hús, hús, hús…

SETHÚSAMARKNAÐURIN

Lesið Sosialin -so eru tit við!